# Einki við trygd at gera

**Tað er reinur vinnupolitikkur, at Elektron og peningastovnarnir eru forðaðir í at halda fram við Gjaldskipanini, sigur Dátueftirlitið. Upplýsingarnar, ið verða sendar av landinum, eru als ikki viðkvæmar og fara til eitt trygt land. Hinvegin hevði landsstýrismaðurin fulla heimild at gera kunngerðina, ið forðar skipanini**

DATATRYGD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Talan er um vinnupolitikk, og tað áttu vit einki at havt við at gera, sigur Turið Debes Hentze, forkvinna í Dátueftirlitinum*

Hatta hevur onki við trygd av persónsupplýsingum og verju av tí einstaka at gera.

So avgjørd er Turið Debes Hentze, forkvinna í Dátueftirlitinum, nú Dátueftirlitið hevur steðgað Gjaldskipanini hjá peningastovnunum.

Á fundi 28. oktober fall so endiliga avgerðin um nógv umrøddu Gjaldskipanina hjá peningastovnunum. Og hon gekk Elektron og peningastovnunum beint ímóti. Peningastovnarnir hava áður fingið loyvi at menna og brúka skipanina, sum í samstarvi við PBS í Danmark avgreiðir peningaflytingar fyri fólk og virki. Tað loyvi er nú tikið aftur.

Í avgerðini hjá Dátueftirlitinum verður sagt, at tað givna loyvið verður ikki afturtikið, og tær persónsupplýsingar og flytingar, sum í dag verða viðgjørdar í skipanini, kunnu halda fram. Hinvegin hevur Dátueftirlitið við grundarlagi í nýggju kunngerðini, sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, setti í gildi 16. juni 2003, avmarkað loyvið. Aðrar upplýsingar enn tær, sum í dag verða viðgjørdar og fluttar av landinum, kunnu ikki koma í skipanina.

Gjalskipanin verður sostatt avmarkað til bert at fevna um tað virksemi, sum í dag er í skipanini. Hon kann ikki útbyggjast. Fólk kunnu ikki koyra nýggjar flytingar í skipanina. Og nýggj fólk og virki kunnu ikki koma upp í skipanina.

## Verða stevnd

Peningastovnarnir hava longu sagt, at teir fara at stevna Dátueftirlitið. Men Dátueftirlitið er púra sannført um, at avgerðin er røtt og hevur heimild bæði í lógini og kunngerðini. Hinvegin er greitt, at avgerðin einki hevur við trygd at gera, sum eftirlitið annars hevur til endamáls at hava eitt vakið eyga við.

– Hetta hevur onki við dátutryggleika at gera. Tað ber ikki til at skjóta hesa kunngerðina, sum avgerðin byggir á, undir trygd av upplýsingum. Men okkara uppgáva er at fylgja teimum lógum og kunngerðum, sum eru settar í verk av løgtingi og landsstýri, og hendan kunngerðin er gjørd fyri at raka akkurát hasa skipanina, og peningastovnarnir eru beinleiðis nevndir, sigur Kitty May Ellefsen, fulltrúi í Dátueftirlitinum.

Upplýsingarnar eru í tryggum hondum, siga bæði fulltrúin og forkvinnan í Dátueftirlitinum, Turið Debes Hentze.

## Í ríkiligt mát

Lógin um persónsupplýsingar hevur til endamáls at tryggja dátuupplýsingar og at verja persónliga integritetin hjá tí einstaka. Ein partur av lógini, grein 16 og 17, snúgva seg um flutning av upplýsingum til útlond, og landsstýrismanninum verður heimilað at gera kunngerð, sum avmarkar flutning uttanlands.

Ta heimildina hevur Høgni Hoydal nýtt. Og tað í ríkiligt mát, heldur Turið Debes Hentze. Hon vísir á, at endamálið við ásetingini um útland er at tryggja, at upplýsingarnar eru tryggar og handfarnar á einsgóðan hátt, sum í Føroyum.

– Fyri tað fyrsta er als ikki talan um viðkvæmar upplýsingar, so sum heilsu, revsing og annað. Hetta eru peningaligar flytingar og einki annað. Tað er heldur eingin ivi um, at Danmark og øll ES lond eru trygg lond í hesum høpi – minst líka trygg sum vit. Harumframt kemur, at hvør einstakur, sum er í skipanini, hevur givið sítt samtykki, og tað er ógvuliga umráðandi. Fólk skulu ráða sær sjálvum, men í hesum føri kemur ein omanífrá og tekur tey av ræði, sigur Turið Debes Hentze.

## Føra vinnupolitikk

Kunngerðin, sum alt stendst av, átti einki at havt við Dátueftirlitið at gera, staðfestir Turið Debes Hentze. Hinvegin er greitt, at landsstýrismaðurin hevur fulla lógarheimild at seta kunngerðina í verk, tí tað er álagt honum av løgtinginum.

– Endamálið at verja tann einstaka er burtur. Kunngerðin hevur eitt vinnupolitiskt endamál, sum er at forða peningastovnunum at flyta sítt virksemi av landinum, og tað hevur einki við Dátueftirlitið at gera. Hinvegin noyðast vit at viðgera tað, tí tað er partur av lógini og kunngerðini, sum hoyrir undir okkum, sigur Turið Debes Hentze.



Givna loyvið um útflutning av persónsupplýsingum verður sostatt ikki afturtikið, men avmarkað til bert at fevna um tær upplýsingar, sum í dag verða útfluttar. Loyvt er sostatt ikki í samband við hesa viðgerð at flyta aðrar og nýggjar persónsupplýsingar av landinum. At aðrar persónsupplýsingar enn

*Kut úr avgerð frá Dátueftirlitinum 28. oktober 2003*

# Elektron stevnir landinum

**Elektron og peningastovnarnir vilja hava endurgjald fyri tær milliónirnar, sum tey hava brúkt til at menna Gjaldskipanina, ið Dátueftirlitið nú hevur steðgað. Helst verða bæði Dátueftirlit og landsstýri stevnd**

DATATRYGD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Elektron og peningastovnarnir hava heitt á sín advokat um at stevna Dátueftirlitinum fyri rættin. Tey vija hava rættin at ógilda avgerðina at steðga Gjaldskipanini. Tey krevja eisini, at Dátueftirlitið ella landsstýrið verða dømd at veita endurgjald fyri øll tap, sum standast av avgerðini fyri føroysku peningastovnarnar, kundar teirra, Elektron og PBS.

Gjaldskipanin hjá peningastovnunum má ikki byggjast út, og fleiri fólk og upplýsingar mugu ikki koyrast í skipaninak, er greiða niðurstøðan, sum Dátueftirlitið mikudagin 28. oktober kom til eftir drúgva viðgerð av málinum.

Alt stríðið byrjaði við einari nýggjari skipan, ið peningastovnarnir tíðliga í fjør settu í verk í Føroyum. Hon nevnist Gjaldskipan. Skipanin er ment í samstarvi millum Elektron og Pengeinstitutternes Betalings Systemer (PBS) í Danmark og er ein føroysk útgáva av væl kenda BetalingService hjá PBS. Talan er sostatt um sjálvvirkandi peningaflytingar, sum fara til Danmarkar at venda og avgreiðast.

Fyrst fekk Elektron loyvi frá Dátueftirlitinum at menna og brúka skipanina, men hesum royndi Høgni Hoydal, landsstýrismaður, av øllum alvi at steðga, tí hann helt hana stríða ímóti lógini um vernd av persónsupplýsingum. Hann hevur nú fingið sín vilja, men tað vilja peningastovnarnir ikki lata sær lynda, gongur fram av brævi, sum Elektron hevur sent Dátueftirlitinum.

Í brævinum, sum er dagfest longu dagin eftir avgerðina, sigur Elektron, at Dátueftirlitið eftir teirra áskoðan ikki hevur heimild at afturkalla loyvið, sum tað áður hevur fingið. Dátueftirlitið grundar sína avgerð á kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003.

Samanumtikið metir Elektron ikki, at kunngerðin er í samsvari við lógina um viðgerð av persónsupplýsingum. Sagt verður, at við kunngerðini »skerjir landsstýrismaðurin møguleikarnar hjá føroyskum borgarum og virkjum at samstarva við útlond, tá talan er um samstarv, ið umfatar flutning av persónsupplýsingum, á ein hátt, sum heimild eftir okkara bestu fatan ikki finst til í lógini«.

Afturat hesum mótmælir Elektron eisini, at ein regla í grein 17 í lógini verður brúkt til at raka ávísa verkætlan, tí tað er í stríð við galdandi rættarsiðvenju. Mótmælt verður eisini, at avgerðin er tikin við afturvirkandi gildi. At enda biður Elektron um, at avgerðin um at steðga skipanini, verður útsett, til sakarmálið er liðugt.

**Fakta**

Brot úr kunngerð nr. 94:

§ 1. Kunngerðin fevnir um persónsupplýsingar og viðgerð av persónsupplýsingum hjá peningastovnum

§ 2. Persónsupplýsingar og viðgerð av persónsupplýsingum í skipanum í Føroyum, hvørs høvuðsinnihald og –nýtsla eru peningaligar transaktiónir, flytingar ella annað samskifti ella virksemi millum einstaklingar, virki, stovnar o.t. í Føroyum, kunnu ikki flytast av landinum. Heldur ikki kann ein partur av hesum flytast av landinum.



# Brandur er ov seinur á veg



*– Brandur var heilt serligur sum barnastjørna, og hann var ikki bara eitt kopi í allari rúgvuni, men sín heilt egin. Trupulleikin í dag er, at Brandur er ikki nøkur barnastjørna, men ein ungdómsstjørna, og tá tosa vit um nakað heilt annað, sigur Jens Ove Friis*

**Stjórin á RecArt, Jens Ove Friis, heldur, at Brandur Enni skuldi longu komið fram sum barnastjørna. Hann er nú komin í ungdómsárini, og tá er kappingin nærmast ógjørlig, tí hann er noyddur at kappast ímóti heimsstjørnum, ið hava stórar altjóða fyritøkur aftanfyri seg.**

TÓNLEIKUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Ein av høvuðsorsøkunum til, at plátufelagið NAME er farið á heysin, eru vánaligu søluúrslitini í Danmark. Hóast føroyska plátufelagið gjørdi í vár eitt rimmar átak fyri at fáa Brand Enni fram í Danmark, so vóru úrslitini ikki nóg góð. Ikki fleiri enn 1000 fløgur eru seldar av Brandi í Danmark, og tað er væl minni, enn væntað.

Vit hava spurt stjóran í RecArt, hví evnaríki Brandur Enni hevur so torført at vinna fram í Danmark. RecArt var fyrsta plátufelagið í Danmark, sum kom fram við hugtakinum barnastjørnur í Danmark. Plátufelagið hevði eina dundrandi succes við bólkinum Creamy seinast í nítiárunum.

– Í 1999 vóru vit fyrstir við Creamy. Fleiri hava roynt síðan at gjørt okkum hugskotið við barnastjørnum eftir, men tey hava havt stórar trupulleikar, tí hugskotið er roynt áður. Hesi plátufeløgini koma tí í aðru røð. Eg síggi ein líknandi trupulleika við Brandi Enni, tí hann er ov seinur á veg, og tað kann vera ein orsøk, at úrslitini ikki hava verið har, sigur stjórin á RecArt.

## Barnastjørnan Brandur

Jens Ove Friis heldur nógv av føroyska Brand Enni, bæði sum persóni og ikki minst sum tónleikara. Hann er sannførdur um, at var Brandur komin fram í Danmark fyri nøkrum árum síðan, hevði føroyska poppstjørnan sligið til.

– Brandur var heilt serligur sum barnastjørna, og hann var ikki bara eitt kopi í allari rúgvuni, men sín heilt egin. Trupulleikin í dag er, at Brandur er ikki nøkur barnastjørna, men ein ungdómsstjørna, og tá tosa vit um nakað heilt annað, sigur Jens Ove Friis. Stjórin á RecArt sigur, at nú er Brandur noyddur at kappast við allar heimsins ungdómsstjørnur, og tá er uppgávan at sláa ígjøgnum nógv torførari og nærmast ógjørlig.

– Ungdómsstjørnurnar í dag hava flest allar stórar altjóða fyritøkur aftanfyri seg, og tá er nærmast ógjørligt at taka kappingina upp. Bara fyri at yvirhøvur at koma upp á tal sum ungdómsstjørna má ein hava eina sterka fígging aftanfyri seg, greiðir Jens Ove Friis frá.

Mamma Brand:

# Øgiliga keðiligt

**– Uppgávan hjá NAME var jú at fáa føroyskan tónleik fram uttanlands, og tí er tað keðiligt fyri okkara tónleikarar at missa henda møguleika, sigur mamma Brand, Ninnie Enni.**

NAME UPPLOYST
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Mamma føroysku poppstjørnuna, Brand Enni, er kedd av, at plátufelagið NAME fer í søguna. Ninnie Enni heldur tað er stórt spell, at peningur skal vanta í og at plátufelagið tískil má gevast.

– Tað er ógvuliga keðiligt, at plátufelagið má gevast, tí uppgávan hjá felagnum var at fáa føroyskan tónleik fram uttanlands, og tað er keðiligt fyri okkara tónleikarar at missa henda møguleika, sigur Ninnie Enni.

## Onga ávirkan

Spurd, um rokið seinastu dagarnar hevur ávirkað Brand, svarar Ninnie, at tað hevur tað ikki. Hann gongur í skúla sum vanligt, og ynskir hann framhaldandi at fáast tónleik, so er einki í vegin fyri tí. Brandur hugsar ikki nógv um tað, ið fer fram í løtuni, men heldur seg til tónleikin.

– Vit hava aldrin væntað tað heilt stóra við Brandi, og vit hava verið ovurfegin um tað, sum er hent, sigur mamma Brand.

Spurd, um hon væntar, at møguleikarnir verða færri hjá soninum at koma fram uttanlands, nú NAME verður uppløyst, svarar mamman, at tað fer helst at fáa avleiðingar. Hon leggur kortini afturat, at Brandur hevur selt eitt ótal av fløgum í bæði Føroyum og Íslandi, áðrenn NAME varð sett á stovn, so tað ber til uttan plátufelagið.

## Krúttunnan Steintór

Ninnie vísir á, at Steintór Rasmussen hevur verið heilt fantastiskur fyri Brand. Hon lýsir hann sum ein krúttunnu, ið ger eitt megnar arbeiði fyri føroyskan tónleik. – Hann hevur uppiborið ein heiðursløn fyri sítt arbeiði, heldur enn at fara á heysin, sigur Ninnie Enni at enda.

# Mist áhugan fyri Brandi

**RecArt bjóðaði í fjør Steintór Rasmussen eitt tilboð í millióna hæddini fyri Brand Enni, men fekk eitt nei. Fyrr í summar var vent í holini. Steintór bjóðaði RecArt Brand Enni, men tá hevði føroyska ungdómsstjørnan ongan áhugað.**

TILBOÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár settu vit Steintór Rasmussen spurningin, um hann ikki átti at tikið av tilboðnum, sum RecArt bjóðaði fyri at fáa Brand Enni knýttan at plátufelagnum. Hann svaraði, at hann metti ikki tilboðið verða nóg gott, og tí avráddu hann og foreldrini hjá Brandi at takka nei. Stjórin í RecArt, Jens Ove Friis, var ógvuliga áhugaður í Brandi fyri einum góðum ári síðan, og sambært stjóranum í RecArt var tilboðið í millióna hæddina.

– Eg var rættiliga áhugaður í Brandi í 2002, men Steintór vildi ikki lata okkum Brand, tí hann metti, at hann kundi fáa meira burturúr honum onkra aðrastaðni, sigur Jens Ove Friis.

## Takkaði nei

Í summar hevur Steintór Rasmussen eftir øllum at døma bjóðað RecArt at gera ein avtalu við Brand Enni, men tá takkaði danska plátufelagið nei.

– Eg var í Føroyum í summar, og vit tosaðu saman. Eg fekk bjóðað Brand Enni, men vit søgdu nei. Brandur er ikki barnastjørna longur, og tað var júst tað, vit, í síni tíð, vóru áhugaðir í. Vit eru alt ov lítið plátufelag til at kappast við tey stóru, og tí hava vit lagt okkum eftir at arbeiða við barnastjørnum og ikki ungdómsstjørnum. Brandur er ein ómetaliga dugnaligur sangari, men hann hevur ikki okkara áhugað longur, sigur stjórin í RecArt.

Spurdur um Brandur framvegis hevur møguleika at sláa til sum ungdómsstjørna, svarar Jens Ove, at Brandur er rættiliga evnaríkur, men stór fígging má til.

– Tað nyttar ikki at arbeiða einsamallur, og halda kortini tætt inni at sær. Okkara royndir eru, at ein kemur ongan veg í tónleikaheiminum uttan góðar samstarvsfelagar, og tí mugu menninir aftanfyri Brand finna góðar og dugnaligar samstarvsfelagir, um ætlanin við at fáa Brand Enni út um landoddarnar skal eydnast, sigur Jens Ove Friis at enda.